# FISKIVINNUROYNDIR **2015**

## Lýsing eftir umsóknum

Fiskivinnuroyndir er játtan hjá Fiskimálaráðnum til tess at stuðla praktiskum, vinnuligum og vísindaligum royndum og kanningum, ið menna og økja um framleidnið í føroyskari fiskivinnu við atliti at lívfrøðiliga, búskaparliga og samfelagsliga burðardyggari gagnnýtslu av havtilfeinginum.

**Verkætlanir, sum stuðul kann søkjast til, eru skipaðar í trý høvuðsøki:**

- Royndarveiða og virðisøking av fiski
- Burðardyggur fiskiskapur
- Búskaparlig og samfelagslig menning av fiskivinnuni

Fyritøkur, almennir stovnar og einstaklingar kunnu søkja um stuðul úr Fiskivinnuroyndum.

**Les meira á fvg.fo**
Her finnur tú programmið fyri 2013-15 við fleiri undirpunktum, umsóknarbløð, vegleiðingar og annað kunnandi tilfar.

**Serligur dentur verður lagdur á, at:**

- Vinnan tekur lut í verkætlanini
- Eginfígging ella onnur fígging er
- Samstarv er við samstarvsfelagar í Føroyum (almennar og/ella privatar) og/ella uttanlands.
- At verkætlanin er skipað við einum stýrisbólki at fylgja við gongdini

Fiskivinnuroyndir kunnu útluta tilsamans 2,208 mió. kr í 2015 til nýggjar og verandi verkætlanir.

Víst verður á, at møguleiki eisini er hjá vinnuni at søkja um stuðul til setan av vinnugranskara innanfyri omanfyrinevndu økir við fígging upp til 50%. (max. 300.000 kr. um árið í 3 ár).

Um tørvur er á at orða hugskot til ítøkiligar verkætlanir ber til at seta seg í samband við samskiparan um hetta. Áhugaði eru eisini vælkomin at venda sær til Jákup Mørkøre, samskipara, við møguligum spurningum.

Umsóknir skulu verða samskiparanum í fiskivinnugransking í hendi í seinasta lagi mánadagin 1. desember 2014, kl. 12.00.

**Jákup Mørkøre, samskipari**
tel.: 35 30 30
fartel.: 55 32 48
t-post: jakupmo@fisk.fo

**Umsóknir skulu sendast til:**
Fiskimálaráðið
Samskiparin í fiskivinnugransking
P.O.Box 347
Yviri við Strond 15
FO-110 Tórshavn

*Fyrivarni verður tikið fyri játtan á løgtingsins fíggjarlóg fyri 2015.*

Fiskimálaráðið

FISKIVINNU GRANSKING